**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Merking av toski og havtasku á Landgrunninum. Túrur nr. 1238**
**Tíðarskeið 11/10 - 14/10 - 2012**

**Fólk frá HAV:** Petur Steingrund, Mourits Mohr Joensen, Poul Vestergaard, Regin Kristiansen, og Sigvald Kristiansen.

**Ábyrgd:** Petur Steingrund, kanningarleiðari.

**Endamál:** Endmálið er at kanna ferðingarmynstrið hjá toski og havtasku á føroyska landgrunninum.

**Reiðskapur:** Kassatrol 116 við 100 mm meskum í brókaposanum. Steinshamn lemmar. Breitlalongin er 60 m. Rockhopper grunnur. Til merkingina: merkipistól og merkir, mátibretti, vekt, kassar og slangur, skriviútgerð og teldur.

**Um túrin:** Fóru av Havnini hósmorgunin 11/10-2012 kl. 9.30. Fóru fyrst vestur á Bøin (í ein útsynning-vestan úr Mykinesi), og merktu har 97 toskar. Fóru síðan á Mýlingsgrunnin, har vit merktu 283 toskar. Hildu fram vestan fyri Skúvoy/Sandoy, fóru eitt legg vestan fyri Suðuroy, men royndu síðan aftur vestan fyri Skúvoy/Sandoy. Vit vóru á Havnini sunnumorgunin. Merkingarlistin er vístur í talvuni niðanfyri.

**Fyribilsúrslit:** Væl gekst at fáa merkt á Mýlingsgrunninum, meðan tað gekk sera striltið í hinum støðunum. Toskurin var størstur vestan fyri Sandoy/Skúvoy (63,4 cm í miðal), meðan hann var smáur á Mýlingsgrunninum (sí talvuna). Toskurin var sum heild sera væl fyri, við konditiónsfaktori (K) oman fyri 1. Vit fingu fýra merktar toskar aftur, sum allir høvdu verið úti í eitt ár.

| Øki | Havtaska | Toskur | Miðallongd | Miðal K |
|---|---|---|---|---|
| Á Mýlingsgrunni | 1 | 283 | 55.0 | 1.18 |
| Á Bønum | 0 | 97 | 61.9 | 1.09 |
| Vestan fyri Sandoy/Skúvoy | 2 | 58 | 63.7 | 1.11 |
| Vestan fyri Suðuroy | 0 | 62 | 57.4 | 1.11 |
| Íalt | 3 | 500 | 57.6 | 1.14 |

**Nær eru merkilistarnir lisnir inn á teldu:**
Merkilistin var liðugur, tá túrurin endaði.

Á Magnusi Heinasyni 14. oktober 2012
Petur Steingrund – kanningarleiðari.